# Landsroyndin 2014

## Frágreiðing um mál, ávegis mál, uppgávur og úrslit

Mentamálaráðið
Oktober 2014

# Landsroyndin 2014

## Almennar viðmerkingar

Sambært § 14, stk. 5 í løgtingslóg um fólkaskúlan skipar landsstýrismaðurin, eftir nærri ásettum reglum, fyri landsroynd í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni á 4. og 6. floks stigi. Landsroyndirnar skulu vera ein liður í arbeiði skúlans at eftirmeta undirvísingina. Í lógini er eisini ásett, at foreldrini skulu verða kunnað um úrslitini av lands- og støðuroyndum.

## Endamál

Endamálið við landsroyndunum er at tryggja skúlum, foreldrum, næmingum, lærarum og myndugleikum innlit í fakliga støðið í fólkaskúlanum, og at geva lærarum og skúlaleiðslu eitt amboð, sum, umframt at meta um fakliga støðið hjá næmingunum, eisini skal nýtast til at laga undirvísingina til tørv og fortreytir hjá tí einstaka næminginum. Eisini er málið við landsroyndunum at styrkja eftirmetingarskipanina í skúlunum.

Landsroyndirnar verða skipaðar í samsvari við málini í einstøku lærugreini, og eru tí ætlaðar sum amboð og ítøkiligt grundarlag hjá myndugleikum, skúlum og foreldrum at fylgja við og meta um fakliga støðið hjá næmingum og flokkum í mun til ásettu málini í námsætlanini. Harumframt er hetta eitt amboð at kunna viðgera úrslitið í einstøku skúlunum í mun miðalúrslitini fyri landið.

## Eftirmeting av landsroyndini 2014

Skúlaleiðarin skal saman við lærarunum í einstøku lærugreinunum og viðkomandi flokslærara viðgera úrslitini frá landsroyndini og leggja eina ætlan fyri, hvussu neyðugar ábøtur skulu fremjast, og hvussu víðari verður arbeitt við at menna undirvísingina í lærugreinunum.

Skúlaleiðarin skal í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at skúlin hevur fingið úrslitini, senda Mentamálaráðnum eina frágreiðing um, hvørji tiltøk og ætlanir úrslitini hava elvt til. Skúlarnir fingu úrslitini í skrivligu landsroyndini 12. juni. 2014, har m.a er víst á, at skúlaleiðarin skal við atliti at úrslitunum í landsroyndini í seinasta lagi 17. sept. 2014 senda Mentamálaráðnum eina frágreiðing um, hvørji tiltøk og ætlanir, skúlin hevur sett í verk.

## Um landsroyndina 2014

Í ár er tað sjeyndu ferð, at skipað verður fyri landsroynd í 4. og 6. flokki í fólkaskúlanum. Fyrsta landsroyndin var í 2008. Royndirnar í 2014 eru skipaðar eftir nøkulunda sama leisti sum frammanundan, men tó eru dagføringar og tillagingar gjørdar í uppgávunum. Tað, sum eisini kann hava ávirka royndarhaldið í ár, er, at ætlanin var, at landsroyndin í 2014 skuldi vera teldutøk, og vóru uppgávuna til landsroyndina gjørdar til eina teldutøka skipan, dokeos, men fyrsta royndardagin vísti tað seg, at skipanin ikki virkaði sum ætlað.

Mentamálaráðið gjørdi tí av at avlýsa teldutøku landsroyndina í ár. Heitt var á uppgávunevndirnar um at tillaga uppgávunar, so næmingarnir kundu taka landsroyndina á pappíri, sum árini frammanundan. Skúlarnir høvdu frammanunan havt undanroyndir í Dokeos skipanini, sum sýntist at virka væl, um ikki ov nógvir næmingar luttóku samstundis. Skúlarnir vóru tí býttir tveir bólkar, fyri at tryggja, at royndin kundi gjøgnumførast, men tíverri virkaði Dokeos skipanin ikki nøktandi. Landsroyndin var tí útsett í tríggjar vikur.

Landsroyndin í 2014, sum skuldi vera 28. – 30. apríl, varð hildin í døgunum 20. – 22. mai, og royndarúrslitini vórðu send skúlunum 12. juni 2014.

Uppgávurnar til landsroyndina eru gjørdar við støði í ávegis málum í námsætlanunum fyri lærugreinirnar føroyskt, støddfrøði og náttúru/tøkni í 4. og 6. flokki. Nýggjar námsætlanir vóru settar í gildi 1. august 2011. Hetta merkir, at nú eru førleikamálini á ymsu floksstigunum samsvarandi orðingunum í nýggju námsætlanunum.

Landsroyndin er ikki longur eitt nýtt fyribrigdi í skúlunum. Næmingarnir í 6. flokki, sum vóru til landsroynd í 2014, hava allir roynt hetta áður í 4. flokki, og hava tí ítøkiligar royndir í at fara til landsroynd.

## Úrslit

Tað er týdningarmikið at leggja dent á, at landsroyndir ikki siga alt um førleikan hjá næmingunum. Royndirnar kunnu tó geva eina ábending um, hvussu støðan er. Úrslitið skal nýtast sum partur av samlaðu eftirmetingini í skúlunum og hjá myndugleikum við atliti at innihaldi, háttalagi o.ø. til tess at betra um undirvísingardygdina og úrtøku næminganna.

Ein samanbering millum úrslit í royndum sum hesari eigur altíð at gerast við størsta fyrivarni. Tað eru ikki somu royndir, næmingarnir taka, tí royndirnar eru tillagaðar øll árini og torleikastigið er eisini hækkað. Tá ið samanberingar kortini verða gjørda, eru tað nógv ymisk viðurskifti, sum atlit skulu takast at. Tað eru ikki somu næmingar, sum hava tikið lut í royndunum, ikki somu lærarar, sum hava havt undirvísingina um hendi, umframt at innihaldið í uppgávunum er tillagað og broytt hesi árini.

Greitt verður frá málum, uppgávum og úrslitum í einstøku lærugreinunum.

# Føroyskt

Endamálið fyri lærugreinina føroyskt.

Undirvísingin í føroyskum hevur til endamáls, at næmingurin:

- mennir sínar lesi- og skriviførleikar umframt síni samskiftisevni
- ognar sær vitan um føroyskar bókmentir, umframt innlit í norðurlendskar og alheims bókmentir
- skapar sær eina heildarfatan av føroyskum máli og málrøkt, bæði í samtíðini og í søguligum høpi
- verður tilvitin um málið sum samskiftisamboð og samskiftismiðil
- verður tilvitin um málsligt fjølbroytni og stíllegur
- mennir góðar og hóskandi arbeiðsvanar, læringarhættir og vandna og kritiska hugsan
- mennir síni skapandi evni
- mennir sín samleika við sjálvsáliti og tryggleika í egnari mentan fyri eyga
- mennir sína virðing og sítt tolsemi fyri øðrum mentanum
- mennir síni vitbornu, kensluligu og felagsligu evni
- fær lagt støði undir lívslanga læring, umhugsni og virkni í samfelagsligum høpi.

---

## Ávegis mál í 4. flokki

### Skrivaða málið

Næmingurin dugir

- at lesa hart og endurgeva egnan og annans tekst
- at tekna, svara skrivligum spurningum ella á annan hátt vísa, at tað lisna er skilt
- at finna høvuðsinnihaldið í yrkis- og fagurbókmentaligum tekstum
- at skilja høvuðstættirnar í skaldskapi av mannamunni
- at gera skrivligar viðmerkingar til tað, hann hevur sæð, hoyrt ella lisið
- at skriva orð og styttri setningar við skilligari handskrift
- at nýta fjølbroytt orðatilfeingi
- at leita fram tilfar á bókasavni og interneti
- at nýta orðabøkur og handbøkur, bæði prentaðar og teldutøkar
- at brúka rættstavara á teldu, soleiðis at stavað verður rætt
- at nýta teldu sum amboð og leita fram upplýsingar.

### Málkunnleiki

Næmingurin dugir

- at brúka orðabøkur til at flokka orð í allar orðaflokkar, og at benda navnorð, sagnorð og lýsingarorð
- grundleggjandi orðalagslæru, t.e. grundlið, umsøgn og ávirki
- at seta punktum og komma millum einfaldar setningar.

Í 4. flokki eigur næmingurin at duga so mikið væl at lesa, at hann sjálvur kann lesa léttar bøkur á móðurmálinum, og næmingurin eigur at duga at skriva stuttar fyrisagnir og sjálvstøðugar søgur.

### Skrivaða málið

Næmingurin dugir

- at skilja og greina ymiskar tekstir við grundleggjandi bókmentafrøðiligum hugtøkum
- at skilja og greina høvuðstættirnar í skaldskapi av mannamunni
- ymiskar lesihættir sum t.d. at snarlesa, nærlesa, punktlesa og vísa, at tað lisna er skilt

- at gera metingar og niðurstøður av tí, hann hevur sæð, hoyrt ella lisið
- at skriva sjálvstøðugt og málsliga rætt við fjølbroyttum orðatilfeingi
- at skriva tekstbrot við skilligari og stinnari handskrift
- at nýta tekstviðgerðarforrit
- at nýta orðabøkur og handbøkur, bæði prentaðar og teldutøkar
- at brúka rættstavara á teldu, so at stavað verður rætt
- at nýta teldu sum amboð og leita fram upplýsingar
- at skriva blindskrift við teldu.

**Samansettir tekstir**
Næmingurin dugir
- at skilja og greina ymiskar samansettar tekstir
- at tosa um ymiskar málsligar stíllegur í sambandi við samansettar tekstir, so sum sms- og kjattmál
- at skapa eina samanhangandi frásøgn við at seta saman orð, ljóð og mynd.

**Málkunnleiki**
Næmingurin dugir
- at brúka orðabøkur til rætta málnýtslu, so sum bendingar og samansetingar av orðum
- orðalagslæru og at greina setningar
- at seta tekn
- at síggja málføramun í føroyskum
- at vísa á kunnleika til norðurlendsku grannamál okkara, serliga norskt og íslendskt, bæði í talu og á skrift.

## Ávegis mál í 6. flokki

### Talaða málið

Næmingurin dugir

- at nýta talumálið klárt og skilliga í t.d. kjaki, samrøðu, framløgu, verkætlan og leiki
- at fata og lýsa samskifti í mun til boðbera, móttakara, miðil og støðu
- at lurta virkin og seta greinandi og metandi spurningar.

### Skrivaða málið

Næmingurin dugir

- at skilja og greina ymiskar tekstir við grundleggjandi bókmentafrøðiligum hugtøkum
- at skilja og greina høvuðstættirnar í skaldskapi av mannamunni
- ymiskar lesihættir sum t.d. at snarlesa, nærlesa, punktlesa og vísa, at tað lisna er skilt
- at gera metingar og niðurstøður av tí, hann hevur sæð, hoyrt ella lisið
- at skriva sjálvstøðugt og málsliga rætt við fjølbroyttum orðatilfeingi
- at skriva tekstbrot við skilligari og stinnari handskrift
- at nýta tekstviðgerðarforrit
- at nýta orðabøkur og handbøkur, bæði prentaðar og teldutøkar
- at brúka rættstavara á teldu, so at stavað verður rætt
- at nýta teldu sum amboð og leita fram upplýsingar
- at skriva blindskrift við teldu.

### Samansettir tekstir

Næmingurin dugir

- at skilja og greina ymiskar samansettar tekstir
- at tosa um ymiskar málsligar stíllegur í sambandi við samansettar tekstir, so sum sms- og kjattmál
- at skapa eina samanhangandi frásøgn við at seta saman orð, ljóð og mynd.

### Málkunnleiki

Næmingurin dugir

- at brúka orðabøkur til rætta málnýtslu, so sum bendingar og samansetingar av orðum
- orðalagslæru og at greina setningar
- at seta tekn
- at síggja málføramun í føroyskum
- at vísa á kunnleika til norðurlendsku grannamál okkara, serliga norskt og íslendskt, bæði í talu og á skrift.

## Uppgávurnar í føroyskum

Landsroyndin í føroyskum í 4. flokki fevndi um fyrisøgn og lesiroynd, *lesa og skilja*. Uppgávan í lesiroyndini var at lesa orð, setningar og styttri søgubrot, og við støði í lisna tekstinum skuldu næmingarnir svara spurningum. Fyrisøgnin var ein innsetingarfyrisøgn. Væntast má, at næmingurin dugir so mikið av mállæru, sum neyðugt er til rættskrivingina á hesum stigi.

Landsroyndin í føroyskum í 6. flokki fevndi um eina lesiroynd, eina mállæruuppgávu og fyrisøgn. Í lesiroyndini skuldi næmingurin lesa styttri og longri tekstir við tilhoyrandi skrivligum spurningum, sum skuldu svarast. Skrivligi parturin fevndi um eina roynd í mállæru og eina innsetingarfyrisøgn.

# Royndarúrslit í 4. flokki

## 4. flokkur – Fyrisøgn

### Royndarúrslit í mun til næmingatøl

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ikki nøktandi | 31 | 21 | 29 | 46 | 117 | 33 | 20 |
| Undir miðal | 33 | 70 | 35 | 46 | 62 | 35 | 35 |
| Miðal | 61 | 107 | 82 | 112 | 129 | 127 | 133 |
| Yvir miðal | 69 | 167 | 89 | 152 | 100 | 80 | 86 |
| Gott | 124 | 144 | 156 | 219 | 82 | 137 | 150 |
| Sera gott | 364 | 159 | 247 | 155 | 133 | 155 | 271 |
| Næmingatal íalt | 682 | 668 | 638 | 730 | 623 | 567 | 695 |

### Talva 1 – Fyrisøgn 4. flokkur




*Talva 1* vísir, at úrslitið í føroyskari fyrisøgn er betri enn í fjør. Tað eru færri næmingar, ið fáa skotmálini undir miðal, og tá mugu vit eisini hava í huga, at næmingatalið er hægri enn í 2013. Fleiri næmingar fáa skotsmálini miðal, yvir miðal og gott. Eisini eru tað fleiri næmingar, sum fáa úrslitið sera gott, enn árini frammanundan, undantikið í 2008.

**Royndarúrslit í % - Fyrisøgn 4.flokkur**

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ikki nøktandi | 4,5 | 3,1 | 4,5 | 6,3 | 18,8 | 5,8 | 2,9 |
| Undir miðal | 4,8 | 10,5 | 5,5 | 6,3 | 10 | 6,2 | 5,0 |
| Miðal | 8,9 | 16 | 12,9 | 15,3 | 20,7 | 22,4 | 19,1 |
| Yvir miðal | 10,1 | 25 | 13,9 | 20,8 | 16,1 | 14,1 | 12,4 |
| Gott | 18,2 | 21,6 | 24,5 | 30 | 13,2 | 24,2 | 21,6 |
| Sera gott | 53,4 | 23,8 | 38,7 | 21,2 | 21,3 | 27,3 | 39,0 |
| Í alt | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Talva 2 – Fyrisøgn 4. flokkur**




*Í Talvu 2*, sum vísur úrslit í %, sæst, at 92, 1 % av næmingunum liggja frá miðal og uppeftir. Í 2013 vóru tað 88% og í 2012 var úrslitið væl lægri, tá 71,3 % vóru í bólkinum frá miðal og uppeftir. 7,9 % av næmingunum fáa úrslit, sum er undir miðal, í mun til 12% í fjør og 28,8% í 2012. Úrslitið vísir eina støðuga framgongd. Tað eru færri næmingar, ið fáa tey vánaligu skotsmálini, og er hetta tal minst í ár.

## Lesa og skilja – 4. flokkur

### Royndarúrslit í mun til næmingatøl

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Krevur bata | 75 | | | | | | |
| Ikki nøktandi | 36 | 44 | 139 | 14 | 7 | 13 | 11 |
| Undir miðal | 65 | 66 | 67 | 17 | 43 | 30 | 7 |
| Miðal | 62 | 81 | 91 | 112 | 103 | 104 | 38 |
| Yvir miðal | 129 | 196 | 85 | 120 | 68 | 73 | 50 |
| Gott | 158 | 183 | 137 | 298 | 214 | 165 | 187 |
| Sera gott | 156 | 101 | 118 | 175 | 181 | 181 | 404 |
| Næmingatal íalt | 681 | 671 | 637 | 736 | 616 | 566 | 697 |

### Talva 3 – Lesa og skilja 4. flokkur




*Talva 3* vísir, at tað eru færri næmingar, sum fáa skotsmálini miðal og undir miðal, enn árini frammanundan, og tað eru rættiliga nógvir næmingar, sum fáa úrslitið sera gott, 404 næmingar, sum er næstan 60% av næmingatalinum. Næmingarnir standa seg væl í royndini at Lesa og skilja, har 591 næmingar av 697 fáa úrslitini gott og sera gott, og er hetta meira enn ¾ av næmingunum.

**Royndarúrslit í % - Lesa og skilja 4. flokkur**

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Krevur bata | 11 | 0 | 0 | 0 | 0 | | |
| Ikki nøktandi | 5,3 | 6,6 | 21,8 | 1,9 | 1,1 | 2,3 | 1,6 |
| Undir miðal | 9,5 | 9,8 | 10,5 | 2,3 | 7,0 | 5,3 | 1,0 |
| Miðal | 9,1 | 12,1 | 14,3 | 15,2 | 16,7 | 18,4 | 5,5 |
| Yvir miðal | 18,9 | 29,2 | 13,3 | 16,3 | 11,0 | 12,9 | 7,2 |
| Gott | 23,2 | 27,3 | 21,5 | 40,5 | 34,7 | 29,2 | 26,8 |
| Sera gott | 22,9 | 15,1 | 18,5 | 23,8 | 29,4 | 32,0 | 58,0 |
| Í alt | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Talva 4 – Úrslit í % - Lesa og skilja 4. flokkur**




*Talva 4* vísir, at 97,4% av næmingunum liggja frá miðal og uppeftir. Hetta talið var 92,5 í 2013 og 91,8 í 2012. Tað eru væl færri næmingar, sum eru undir miðal, 2,6%. Í 2013 vóru 7,5% í bólkunum undir miðal og ikki nøktandi og í 2012 var talið 8,2%. Serliga nógvir næmingar, 58% fáa skotsmálið sera gott, sum er væl hægri enn árini frammanundan, tá hesin næmingabólkur hevur ligið frá 15,1% í 2009 til 32% í 2013. Næmingarnir standa seg væl í royndini, har 84,8% fáa úrslitini gott og sera gott, sum er nógv hægri enn øll árini frammanundan, tá hesin næmingapartur hevur ligið frá 40% til 64,1%.

# Royndarúrslit í 6. flokki

## 6. flokkur – Fyrisøgn

### Royndarúrslit í mun til næmingatøl

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ikki nøktandi | 11 | 8 | 1 | 17 | 53 | 15 | 10 |
| Undir miðal | 27 | 17 | 25 | 22 | 59 | 42 | 17 |
| Miðal | 78 | 46 | 63 | 75 | 149 | 189 | 107 |
| Yvir miðal | 99 | 153 | 146 | 159 | 111 | 115 | 123 |
| Gott | 228 | 254 | 208 | 194 | 161 | 141 | 178 |
| Sera gott | 234 | 249 | 252 | 201 | 120 | 92 | 180 |
| Næmingatal íalt | 677 | 727 | 695 | 668 | 653 | 594 | 615 |

**Talva 5 – Fyrisøgn 6. flokkur**




*Talva 5* vísir, at fleiri næmingar hava fingið úrslitið sera gott enn í 2012 og 2013. Eisini er talið á næmingum, sum fáa úrslit undir miðal, lækkað seinastu trý árini frá 112 næmingum í 2012 til 57 í 2013 og 27 næmingar í 2014.

**Royndarúrslit í % - Fyrisøgn 6. flokkur**

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ikki nøktandi | 1,6 | 1,1 | 0,1 | 2,5 | 8,1 | 2,5 | 1,6 |
| Undir miðal | 4,0 | 2,3 | 3,6 | 3,3 | 9,0 | 7,1 | 2,8 |
| Miðal | 11,5 | 6,3 | 9,1 | 11,2 | 22,8 | 31,8 | 17,4 |
| Yvir miðal | 14,6 | 21,0 | 21,0 | 23,8 | 17,0 | 19,4 | 20,0 |
| Gott | 33,7 | 34,9 | 29,9 | 29 | 24,7 | 23,7 | 28,9 |
| Sera gott | 34,6 | 34,3 | 36,3 | 30,1 | 18,4 | 15,5 | 29,3 |
| Í alt | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Talva 6 – Úrslit í % - Fyrisøgn 6. flokkur**




*Talva 6* vísir, at næmingarnir í 6. flokki hava klárað fyrisøgnina væl sammett við seinastu tvey árini frammanundan. Úrslitið frá miðal til sera gott er 95,6% í mun til 90,4% í fjør og 82, 9% í 2012. Úrslitini í 2009 og 2010 vóru tó eitt vet betri enn í ár, tá næmingarnir, ið fingu úrslitini frá miðal til sera gott, vóru 96,6% í 2009 og 96,3 í 2010.

# 6. flokkur – Lesa og skilja

### Royndarúrslit í mun til næmingatøl

### Talva 7 – Lesa og skilja 6. flokkur

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ikki nøktandi | 40 | 30 | 30 | 29 | 1 | 1 | 11 |
| Undir miðal | 47 | 25 | 36 | 23 | 21 | 16 | 21 |
| Miðal | 70 | 48 | 111 | 81 | 123 | 83 | 91 |
| Yvir miðal | 127 | 100 | 134 | 226 | 48 | 81 | 44 |
| Gott | 157 | 253 | 194 | 250 | 285 | 138 | 173 |
| Sera gott | 154 | 270 | 189 | 58 | 161 | 276 | 280 |
| Næmingatal | 595 | 726 | 694 | 667 | 639 | 595 | 620 |




*Talva 7* vísir, at talið á næmingum, sum hava fingið úrslitið sera gott, er hægri enn árini frammundan, at fleiri næmingar enn í 2013 hava fingið úrslitið gott, men eisini at fleiri næmingar hava fingið úrslit undir miðal enn seinastu tvey árini.

**Royndarúrslit í % - Lesa og skilja 6. flokkur**

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ikki nøktandi | 6,7 | 4,1 | 4,3 | 4,3 | 0,2 | 0,2 | 1,8 |
| Undir miðal | 7,9 | 3,4 | 5,2 | 3,4 | 3,3 | 2,7 | 3,4 |
| Miðal | 11,8 | 6,6 | 16 | 12,1 | 19,2 | 13,9 | 14,7 |
| Yvir miðal | 21,3 | 13,8 | 19,3 | 33,9 | 7,5 | 13,6 | 7,1 |
| Gott | 26,4 | 34,8 | 28,0 | 37,5 | 44,6 | 23,2 | 27,9 |
| Sera gott | 25,9 | 37,2 | 27,2 | 8,7 | 25,2 | 46,4 | 45,2 |
| Í alt | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Talva 8 – Úrslit í % - Lesa og skilja 6. flokkur**




*Talva 8* vísir, at næmingarnir hava klárað uppgávuna væl, men eitt vet lakari enn í 2013. Næmingatalið, sum hava fingið úrslit undir miðal, er hækkað hækkað í mun 2012 og 2013. Í 2014 hava 5,4% av næmingunum fingið skotsmál undir miðal. Í 2012 vóru tað 3,5% og í 2013 vóru tað 2,9%. Næmingarnir, sum fáa úrslit undir miðal, eru tó færri í 2014 enn árini frá 2008 – 2011, tá 7,5 til 14,6% fingu úrslitini undir miðal og ikki nøktandi.

Í 2014 eru tað 73,1% av næmingunum, sum fáa úrslitini gott og sera gott, og er hetta úrslitið hægri enn øll hini árini frammanundan, tá næmingar, sum hava fingið hesi úrslit, hava ligið frá 46,2% í 2011 til 72% í 2009. Sostatt fáa næstan ¾ av næmingunum úrslitini gott og sera gott.

# 6. flokkur – Málllæra

## Royndarúrslit í mun til næmingatøl

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ikki nøktandi | 52 | 15 | 8 | 21 | 25 | 19 | 21 |
| Undir miðal | 116 | 54 | 48 | 30 | 27 | 64 | 44 |
| Miðal | 198 | 86 | 111 | 111 | 153 | 149 | 216 |
| Yvir miðal | 131 | 232 | 197 | 226 | 105 | 88 | 101 |
| Gott | 118 | 175 | 158 | 166 | 237 | 143 | 127 |
| Sera gott | 61 | 163 | 173 | 114 | 104 | 132 | 108 |
| Næmingatal | 676 | 725 | 695 | 668 | 651 | 595 | 617 |

**Talva 9 – Málllæra 6. flokkur**




*Talva 9* vísir, at færri næmingar í 2014 hava fingið skotsmálið sera gott enn í 2013, men at talið er á leið tað sama sum í 2012 og 2011. Færri hava eisini fingið skotsmálið gott í mun til hini árini, undantikið í 2008, og fleiri hava fingið úrslitið miðal enn árini frammanundan. Tey, sum hava fingið undir miðal og ikki nøktandi, eru færri enn í 2013.

**Royndarúrslit í % - Mállæra 6. flokkur**

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ikki nøktandi | 7,7 | 2,1 | 1,2 | 3,1 | 3,8 | 3,2 | 3,4 |
| Undir miðal | 17,2 | 7,4 | 6,9 | 4,5 | 4,1 | 10,8 | 7,1 |
| Miðal | 29,3 | 11,9 | 16,0 | 16,6 | 23,5 | 25,0 | 35,0 |
| Yvir miðal | 19,4 | 32,0 | 28,3 | 33,8 | 16,1 | 14,8 | 16,4 |
| Gott | 17,5 | 24,1 | 22,7 | 24,9 | 36,4 | 24,0 | 20,6 |
| Sera gott | 9,0 | 22,5 | 24,9 | 17,1 | 16,0 | 22,2 | 17,5 |
| Í alt | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Talva 10 – Úrslit í % - mállæra 6. flokkur**




*Talva 10* vísir, at ein góður triðingur - 35% av næmingunum í 2014 hava fingið úrslitið miðal, og er hetta væl hægri enn árini frammanundan.  Hinvegin liggja úrslitini yvir miðal, sum er 16,4% og gott, sum er 20,6%, í lægra endanum samanborið við árini frammanundan. 89,5% av næmingunum liggja frá miðal til sera gott, og er hetta lægri enn øll árini undantikið í 2008 og 2013, tá ávikavist 75,1 og 86% lógu frá miðal til sera gott. Í 2013 vóru tó nógvir næmingar, sum fingu úrslitini gott og sera gott, og vigar hetta upp ímóti, so at miðalúrslitið í 2014 er lægri enn árini frammanundan undantikið í 2008.

**Niðurstøður**
**Fyrisøgn í 4. flokki**
Fyrisøgnin fatar um 100 orð. Tað eru vanlig orð, sum mett verður, at flestu næmingar í 4. flokki eiga at kenna. Onkur orð eru ímillum, sum bara teir allar dugnaligastu næmingarnir klára, t.d. er eitt dømi um annan lýsingarhátt, sum bara fáir næmingar hava stavað rætt.

Úrslitið vísir eina støðuga framgongd. Tað eru færri næmingar, ið fáa vánaligu skotsmálini, og er hetta tal minst í ár, har 7,9% fáa úrslit, ið eru undir miðal. 92, 1 % av næmingunum liggja frá

miðal og uppeftir. Í 2013 vóru tað 88% og í 2012 var úrslitið væl lægri, tá 71,3 % vóru í bólkinum frá miðal og uppeftir.

**Lesa og skilja í 4. flokki**
Uppgávurnar í lesa og skilja eru gjørdar soleiðis, at so at siga allir næmingar í 4. flokki eiga at klára ein part av teimum. Hetta fyri, at øll skulu kenna tað sum eina góða uppliving at vera til roynd. Spurningarnir 6 og 7 í partinum 14 til 17 er tann parturin, har flestu næmingar fara skeivir, tí her krevst annað enn bara lesing, her skal eisini lesifatan valda.

Í ár er eisini ein minni kanning av málsliga førleikanum hjá næmingunum í 4. flokki. Tað eru uppgávurnar á síðu 18 og 19. Summi orð og máliskur á hesum síðunum eru nakað trupul og krevja umhugsan, men tað eru nógvir næmingar, sum hava funnið røttu loysnirnar.

Næmingarnir standa seg væl í royndini at lesa og skilja, har 84,8% fáa úrslitini gott og sera gott, sum er nógv hægri enn øll árini frammanundan, tá hesin næmingapartur hevur ligið frá 40% til 64,1%.

**Fyrisøgn í 6. flokki**
Næmingarnir kláraðu seg rímiliga væl í fyrisøgnini, og uppgávurnar vóru lættar at lesa. Tað vóru tó villur, sum gingu aftur hjá nógvum næmingum m.a. tátíðar lýsingarháttur, bundin hvørkikynsorð, at skilja millum í og ý, skriva un fyri hvørjumfalsendingina um og skriva við lítlum aftan á punktum. Fyrstu árini vóru altíð nógvar villur í orðum sum stuttligt, øllum, yvir, eftir, undir, men tað vísir seg, at hesi orð duga næmingarnir nú nógv betur at stava.

Næmingarnir í 6. flokki hava klárað fyrisøgnina væl sammett við seinastu tvey árini frammanundan. Úrslitið frá miðal til sera gott er 95,6% í mun til 90,4% í fjør og 82, 9% í 2012. Úrslitini í 2009 og 2010 vóru tó eitt vet betri enn í ár, tá næmingarnir, ið fingu úrslitini frá miðal til sera gott, vóru 96,6% í 2009 og 96,3 í 2010.

**Lesa og skilja í 6. flokki**
Næmingarnir kláraðu seg væl í at Lesa og skilja. Flestu villur vóru í fjórða spurningi á síðu 11 og fjórða spurningi á síðu 12, har svarið ikki stóð beinleiðis í tekstinum. Spurningurin er so, um nakrir spurningar skuldu verið afturat, har svarið ikki beinleiðis var at finna í tekstinum. Flestu næmingar megnaðu at koma ígjøgnum alla uppgávuna.

Í 2014 eru tað 73,1% av næmingunum, sum fáa úrslitini gott og sera gott, og er hetta úrslitið hægri enn øll hini árini frammanundan, tá næmingar, sum hava fingið hesi úrslit, hava ligið frá 46,2% í 2011 til 72% í 2009. Sostatt fáa næstan ¾ av næmingunum úrslitini gott og sera gott.

Úrslitið er tó eitt vet lakari enn í 2013. Næmingatalið, sum hava fingið úrslit undir miðal, er hækkað í mun 2012 og 2013. Í 2014 hava 5,4% av næmingunum fingið skotsmál undir miðal. Í 2012 vóru tað 3,5% og 2,9% í 2013.

**Málløra í 6. flokki**
Mállæran varð broytt í fjør, soleiðis at hon hóskaði betur til talgilda roynd. Hon varð gjørd á sama hátt í ár. Allar uppgávurnar, sum vóru nógvar í tali, skuldu svarast við at seta x fyri rætt svar. Næmingarnir hava helst følt uppgávuna lætta, men hetta hevði eisini við sær, at tað var ov lætt at seta ein x og vóna, at svarið var rætt. Hetta var serliga galdandi fyri tær uppgávur, har næmingarnir skuldu seta x við endingina i ella ið. Var uppgávan á teldu, sum ætlað, so sá næmingurin bara eina uppgávu í senn, og hevði hann kanska hugsað meira um svarið.

Næstan allir næmingarnir hava rætt svar í hesum uppgávum: bókstavaraðið, stigbenda lýsingarorð og greina setningar. Nógvir dugdu eisini nútíðarendingar, orðaflokkar og navnorð, eintal/fleirtal, óbundin/bundin og kyn, men flestu feilirnir vóru í lýsingarhátti í tátíð og navnorð bundin/óbundin.

Meira enn ein triðingur - 35% av næmingunum hava fingið úrslitið miðal, og er tað rættiliga stórur partur í mun til árini frammanundan. 89,5% av næmingunum liggja frá miðal til sera gott, og er hetta lægri enn øll árini undantikið í 2008 og 2013, tá ávikavist 75,1% og 86% lógu frá miðal til sera gott. Í 2013 vóru tó nógvir næmingar, sum fingu úrslitini gott og sera gott, so at miðalúrslitið í 2014 er lægri enn árini frammanundan undantikið í 2008.

# Støddfrøði

Undirvísingin í støddfrøði hevur til endamáls, at næmingurin

- mennir sín støddfrøðiliga førleika so, at hann við fyrimuni kann standa seg í støddfrøðiligum umstøðum sum viðvíkja gerandislívi, samfelagslívi og náttúruviðurskiftum
- ognar sær kunnleika um tann partin av støddfrøðini, sum hevur týdning fyri mentan, vísindi og tøkni
- fær greiða fatan av, at samskifti og samstarv um støddfrøðilig viðurskifti eggja til og eru mennandi fyri skapandi virksemi
- fær greiðu á, hvussu støddfrøðin kann vera við til at fremja fatan, seta orð á og viðgera trupulleikar á ymiskum fakøkjum, umframt geva innlit í støddfrøðiliga umhugsan
- verður tilvitaður um, hvussu støddfrøðin kann verða nýtt, tá ið vit taka ábyrgd og fremja ávirkan í demokratiskum felagsskapi
- betur gerst førur fyri meta um og taka støðu, tá ið onnur nýta støddfrøðina í sínum virksemi
- fær tann førleika, ið krevst, fyri at hann skal megna at greiða úr hondum eina útbúgving, sum støddfrøðin er partur av.

## Ávegis mál í 4. flokki

### Tøl og algebra

Næmingurin dugir

- at skyna á støðubundnu talskipanini við *einarum, tíggjarum* og *hundrarum*
- at kenna mun á makaðum og støkum tølum og positivum og negativum tølum
- einføld brot og desimaltøl og at runda
- mannagongdir, tá ið tøl við fleiri talteknum verða løgd saman ella drigin frá, bæði í høvdinum og á pappíri
- at nýta lítlutabell og at falda tøl, ið hava fleiri taltekn
- einfalda býting, t.d. við ítøkiligum tilfari og dømum úr gerandisdegnum
- raðfylgjuna á rokniháttunum
- krossskipanina og sambandið millum tøl og tekning
- loysa einfaldar líkningar, sum hava samanlegging, frádrátt og falding í sær
- at nýta lummaroknara at loysa uppgávur úr gerandisdegnum.

### Geometri

Næmingurin dugir

- at greiða frá eyðkennum hjá tríkantum, fýrkantum og sirklum
- at rokna ummál og vídd á tríkantum og fýrkantum
- at vaksa og minka skap í støddarlutfalli
- at spegla og flyta einføld skap og kenna samskap og allíki
- at meta um og máta rúmd og vekt.

### Støddfrøði í brúki

Næmingurin dugir

- at savna og skipa dátur og hagtøl og vísa tey við ritmyndum

- at loysa praktiskar uppgávur um keyp og sølu, umframt einfalda renturokning
- grundleggjandi hugtøk í talgildum rokniarki.

### Samskifti og spurdómar

Næmingurin dugir

- at lýsa støddfrøðiligar mannagongdir og greiða frá teimum, har ímillum at lýsa egin uppskot til loysnir
- at meta um úrslit
- at arbeiða saman um greiðsluevni, sum hava í sær fleiri loysnir.

#### 6. floksstig

### Tøl og algebra

Næmingurin dugir

- at skyna á støðubundnu talskipanini
- at kenna positiv og negativ tøl umframt makað og støk tøl
- at kenna desimaltøl, t.d. í sambandi við pening og at runda
- at rokna í teimum fýra roknaháttunum, í høvdinum, á pappíri og við lummaroknara
- raðfylgjuna á roknaháttunum
- at leggja saman, draga frá og falda brot
- at rokna einfalda prosentrokning
- at loysa einfaldar líkningar og vísa á dømi um nýtslu av brigdli í einføldum líkningum og formlum
- krossskipanina og sambandið millum tøl og tekning
- at nýta lummaroknara at loysa uppgávur og greiðsluevni.

### Geometri

Næmingurin dugir

- at arbeiða við hugtøkini *punkt*, *linjustykki*, *rættar linjur* og *vinklar*.
- hugtøkini *radius*, *tvørmát* og *vinkulmát*.
- at neyvtekna tríkantar, fýrkantar og sirklar
- at spegla, snara og javnflyta
- nýta krossskipan m.a. til at lýsa staðseting og flyting
- at brúka mátilutfall til at rokna fjarstøðu og gera einføld kort og arbeiðstekningar
- at máta við hóskandi mátieindum og umrokna frá einari eind til aðra, t.d. *cm*, *m* og *km*, *g*, *kg* og *tons* umframt *dl* og *l*.

### Støddfrøði í brúki

Næmingurin dugir

- at velja roknihátt og rokna í teimum fýra roknaháttunum
- at umrokna frá okkara peningi til fremmant gjaldoyra
- at rokna í sambandi við keyp og sølu, so sum avslátt, vinning og tap
- einfalda renturokning, t.d. av innistandandi peningi og láni
- at savna og skipa dátur og hagtøl, og vísa tey við ritmyndum
- grundleggjandi hugtøk í talgildum rokniarki.

**Samskifti og spurdómar**

Næmingurin dugir

- at savna og skipa dátur í sambandi við eygleiðingar, spurnarkanningar og royndir
- at leggja úrslit fram í talvum og ritmyndum, at lesa og greina tær bæði munnliga, á pappíri og við hentleikunum í talgildum rokniarki
- at arbeiða saman um greiðsluevni, sum hava í sær fleiri loysnir.

**Uppgávurnar í støddfrøði**

Landsroyndirnar vóru settar í verk skúlaárið 2007/08. Fyrstu trý árini var lítil broyting gjørd í uppgávunum við atliti at uppgávuslagi, sniði og torleikastigi. Úrslitið av hesum var, at svarini bæði í 4. og 6. flokki vístu rímiliga góð úrslit frá byrjan av, og at næmingarnir skjótt vandu seg við uppgávurnar.

Samsvarandi hesum eru uppgávurøðini broytt og støðið hækkað, fyrst í 4. flokki og seinni bæði í 4. og 6. flokki, soleiðis at uppgávur, sum nógvir næmingar duga, eru gjørdar truplari, og at nýggj uppgávusløg eru løgd afturat.

## Royndarúrslit í 4. flokki

Fult stigatal í 2014 er 100 stig. Árini frammanundan hevur fult stigatal verið 50 stig og hetta ger, at beinleiðis samanberingar ikki verða gjørdar millum stigatalið í 2014 og stigatølini fyri árini 2008 – 2013. Miðal stigatalið fyri alt landið í 2014 er 79,95 stig.

**Skotsmál í mun til stigabýtið**

| Stigabýtið | Skotsmál | Í stigum |
|---|---|---|
| 0 – 24 | Ikki nøktandi | 1 |
| 25 – 49 | Undir miðal | 2 |
| 50 – 69 | Miðal | 3 |
| 70 – 79 | Yvir miðal | 4 |
| 80 – 94 | Gott | 5 |
| 95 – 100 | Sera gott | 6 |

**Stigabýtið 4. flokkur 2014**






**Stigabýtið –4. flokkur 2008 – 2014**

| | 2008 | | 2009 | | 2010 | | 2011 | | 2012 | | 2013 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stig | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % |
| 00 - 10 | 0 | 0 | 2 | 0,3 | 0 | 0 | 1 | 0,1 | 0 | 0 | 1 | 0,2 |
| 11-20 | 6 | 0,9 | 5 | 0,7 | 2 | 0,3 | 11 | 1,5 | 13 | 2,1 | 21 | 3,7 |
| 21 - 30 | 56 | 8,1 | 35 | 5,2 | 41 | 6,4 | 47 | 6,3 | 64 | 10,3 | 61 | 10,7 |
| 31 - 40 | 263 | 38,1 | 168 | 25 | 149 | 23,1 | 191 | 25,7 | 201 | 32,4 | 163 | 28,6 |
| 41 - 50 | 365 | 52,9 | 463 | 68,8 | 453 | 70,2 | 495 | 66,4 | 343 | 55,2 | 323 | 56,8 |
| Tilsamans | 690 | 100 | 673 | 100 | 645 | 100 | 745 | 100 | 621 | 100 | 569 | 100 |
| Miðal | 39,9 | | 42 | | 42,4 | | 41,3 | | 39,9 | | 39,9 | |

| | 2014 | |
|---|---|---|
| Stig | Næm | % |
| 00-10 | 0 | 0 |
| 11-20 | 0 | 0 |
| 21-30 | 3 | 0,4 |
| 31-40 | 6 | 0,9 |
| 41-50 | 16 | 2,3 |
| 51-60 | 33 | 4,7 |
| 61-70 | 95 | 13,6 |
| 71-80 | 171 | 24,5 |
| 81-90 | 217 | 31,0 |
| 91-100 | 158 | 22,6 |
| Tilsamans | 699 | 100 |
| Miðal | 79,95 | |

**Talva 11 – Stigabýtið í % - støddfrøði 4. flokkur**




*Talva 11* vísir, at tað eru rættiliga fáir næmingar, sum fáa undir 60 stig. Meginparturin av næmingunum, 91,7% fáa stigatal, ið liggur frá 61 – 100 stig og fáa sostatt skotsmál frá miðal til sera gott. Tað eru tó fleiri, sum fáa skotsmálið miðal, tí miðal fatar um stigini 50 – 69. Harumframt vísir talvan, at 78,1% fáa stigatal frá 71 – 100 stig, so tað er meira enn ¾ av næmingunum, sum liggja í hesum bólki.

Broytta stigabýtið ger, at stigatølini í 2014 ikki beinleiðis kunnu samanberast við árini frammanundan, men tað sæst tó, at bæði tá ið talan er um 50 stig og 100 stig, so eru flestu næmingar í trimum teimum hægstu stigabólkunum.

**Próvtalsbýtið – 4. flokkur 2008 – 2014**

| Skotsmál | | 2008 | | 2009 | | 2010 | | 2011 | | 2012 | | 2013 | | 2014 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % |
| Ikki nøktandi | 1 | 0 | 0 | 2 | 0,3 | 0 | 0 | 2 | 0,3 | 1 | 0,2 | 3 | 0,5 | 1 | 0,1 |
| Undir miðal | 2 | 19 | 2,8 | 15 | 2,2 | 9 | 1,4 | 21 | 2,8 | 26 | 4,2 | 36 | 6,3 | 22 | 3,2 |
| Miðal | 3 | 117 | 17,0 | 59 | 8,8 | 67 | 10,4 | 86 | 11,5 | 120 | 19,3 | 89 | 15,6 | 112 | 16,0 |
| Yvir miðal | 4 | 145 | 21,0 | 113 | 16,8 | 79 | 12,3 | 96 | 12,9 | 111 | 17,9 | 100 | 17,6 | 166 | 23,8 |
| Gott | 5 | 333 | 48,2 | 362 | 53,8 | 346 | 53,6 | 455 | 61,1 | 251 | 40,4 | 237 | 41,7 | 316 | 45,2 |
| Sera gott | 6 | 76 | 11,0 | 122 | 18,1 | 144 | 22,3 | 85 | 11,4 | 112 | 18,0 | 104 | 18,3 | 82 | 11,7 |
| Samtal | | 690 | 100 | 673 | 100 | 645 | 100 | 745 | 100 | 621 | 100 | 569 | 100 | 699 | 100 |
| Miðal | | 4,48 | | 4,76 | | 4,85 | | 4,66 | | 4,48 | | 4,48 | | 4,46 | |

**Talva 12 – Próvtalsbýtið í % - Støddfrøði 4. flokkur**




*Talva 12* vísir, at 3,3% hava fingið úrslitið undir miðal og ikki nøktandi samanborið við 6,8% í 2013 og 4,4% í 2012. Tað eru sostatt færri næmingar, sum hava fingið úrslit undir miðal, enn seinastu tvey árini. Samstundis sum næmingaparturin, ið liggur frá miðal til sera gott, er hægri, 96,7% í mun til 93,2% í 2013 og 95,6% í 2012. Úrslitini yvir miðal og gott liggja hægri enn í 2012 og 2013, meðan færri næmingar hava fingið úrslitið sera gott.

# Royndarúrslit í 6. flokki

Fult stigatal er 100 stig. Miðalstigatalið fyri alt landið í 2014 er 75,9 í mun til 72,4 stig í 2013. Í 2012 var miðalstigtalið 70,8. Í 2011 var tað 75,8 stig, í 2010 var miðalstigatalið 75,1 stig, og í 2009 var tað 75 stig. Niðan fyri er yvirlit yvir skotsmál i mun til stigabýtið og talvur, sum vísa stiga- og próvtalsbýtið í 2012.

| Stig | Skotsmál | Í stigum |
|---|---|---|
| 00 - 24 | Ikki nøktandi | 1 |
| 25 - 49 | Undir miðal | 2 |
| 50 - 69 | Miðal | 3 |
| 70 - 79 | Yvir miðal | 4 |
| 80 - 94 | Gott | 5 |
| 95 - 100 | Sera gott | 6 |

**Stiga- og próvtalsbýtið 6. flokkur 2014**






**Stigabýtið - 6. flokkur 2008 – 2014**

| | 2008 | | 2009 | | 2010 | | 2011 | | 2012 | | 2013 | | 2014 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stigabýtið | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % |
| 00 - 10 | 8 | 1,2 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 0,3 | 1 | 0,2 | 2 | 0,3 | 0 | 0 |
| 11-20 | 3 | 0,4 | 2 | 0,3 | 1 | 0,1 | 1 | 0,1 | 4 | 0,6 | 2 | 0,3 | 0 | 0 |
| 21 - 30 | 10 | 1,5 | 5 | 0,7 | 9 | 1,3 | 12 | 1,8 | 16 | 2,5 | 18 | 3,0 | 6 | 1,0 |
| 31 - 40 | 31 | 4,5 | 19 | 2,6 | 18 | 2,5 | 26 | 3,9 | 36 | 5,6 | 22 | 3,7 | 13 | 2,1 |
| 41 - 50 | 87 | 12,7 | 36 | 5 | 37 | 5,2 | 21 | 3,1 | 57 | 8,8 | 50 | 8,4 | 35 | 5,7 |
| 51 - 60 | 98 | 14,3 | 96 | 13,2 | 78 | 10,9 | 75 | 11,2 | 77 | 11,9 | 71 | 11,9 | 43 | 7,0 |
| 61 - 70 | 126 | 18,4 | 109 | 15 | 117 | 16,3 | 96 | 14,3 | 98 | 15,1 | 75 | 12,6 | 88 | 14,3 |
| 71 - 80 | 130 | 19 | 136 | 18,8 | 135 | 18,9 | 107 | 15,9 | 114 | 17,6 | 105 | 17,6 | 161 | 26,2 |
| 81 - 90 | 135 | 19,7 | 202 | 27,9 | 176 | 24,6 | 154 | 22,9 | 123 | 19 | 131 | 21,9 | 162 | 26,3 |
| 91 - 100 | 57 | 8,3 | 120 | 16,6 | 145 | 20,3 | 178 | 26,5 | 122 | 18,8 | 121 | 20,3 | 107 | 17,4 |
| Tilsamans | 685 | 100 | 725 | 100 | 716 | 100 | 672 | 100 | 648 | 100 | 597 | 100 | 615 | 100 |
| Miðal | 67,1 | | 74,5 | | 75,1 | | 75,8 | | 70,8 | | 72,4 | | 75,9 | |

**Talva 13 - Stigabýtið í % - Støddfrøði 6. flokkur**




*Talva 13* vísir, at tað eru færri næmingar, sum fáa hægsta stigabýtið frá 91 – 100 stig enn flestu árini frammaundan. Næmingaparturin, ið fær stigatalið 71 - 80 er hægri enn øll árini frammanundan, og tað sama er galdandi fyri stigatalið frá 81 – 90 undantikið í 2009.

**Próvtalsbýtið – Støddfrøði 6. flokkur (2008 – 2014)**

| Skotsmál | 2008 | | 2009 | | 2010 | | 2011 | | 2012 | | 2013 | | 2014 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % | Næm | % |
| 1 | 13 | 1,9 | 4 | 0,5 | 3 | 0,4 | 8 | 1,2 | 11 | 1,7 | 12 | 2,0 | 1 | 0,1 |
| 2 | 109 | 15,9 | 52 | 7,2 | 57 | 8,0 | 50 | 7,4 | 99 | 15,3 | 77 | 12,9 | 49 | 8,0 |
| 3 | 227 | 33,1 | 197 | 27,2 | 187 | 26,1 | 168 | 25,0 | 164 | 25,3 | 140 | 23,5 | 124 | 20,1 |
| 4 | 132 | 19,3 | 135 | 18,6 | 134 | 18,7 | 100 | 14,9 | 120 | 18,5 | 102 | 17,1 | 151 | 24,6 |
| 5 | 175 | 25,6 | 277 | 38,2 | 243 | 34,0 | 255 | 38,0 | 189 | 29,2 | 199 | 33,3 | 238 | 38,7 |
| 6 | 29 | 4,2 | 60 | 8,3 | 92 | 12,8 | 91 | 13,5 | 65 | 10,0 | 67 | 11,2 | 52 | 8,5 |
| Tilsamans | 685 | 100 | 725 | 100 | 716 | 100 | 672 | 100 | 648 | 100 | 597 | 100 | 615 | 100 |
| Miðal | 3,63 | | 4,12 | | 4,16 | | 4,22 | | 3,88 | | 4,01 | | 4,19 | |

**Talva 14 – Próvtalsbýtið í % - Støddfrøði 6. flokkur**




*Talva 14* vísir, at úrslitið miðal liggur lægri enn øll árini frammanundan, meðan úrslitið yvir miðal er væl betri enn øll árini frá 2008 – 2013 og úrslitið gott er eisini eitt vet betri enn hini árini. Næmingaparturin, sum tilsamans fær skotsmálini sera gott og gott, er 47,2%, sum er hægri enn árini frammanundan undantikið í 2011. Í 2013 fingu 44.5% skotsmálið sera gott og gott og í 2012 var talið 39,2%. Næmingarnir, sum fáa frá miðal til sera gott telja 91,9%, sum er hægri enn hini árini frammanundan við undantak av 2009, tá talið var 92,3%.

**Niðurstøður**

**4. flokkur**

Stigabýtið í 2014 er broytt, soleiðis at fult stigatal er 100 stig. Árini frammanundan hevur fult stigatal verið 50 stig og hetta ger, at tað er trupult at gera beinleiðis samanberingar millum stigatalið í 2014 og stigatølini fyri árini 2008 – 2013.

Úrslitið vísir, at tað eru rættiliga fáir næmingar, sum fáa undir 60 stig. Meginparturin av næmingunum, 91,7% fáa stigatal, ið liggur frá 61 – 100 stig og fáa sostatt skotsmál frá miðal til sera gott. 78,1% fáa stigatal frá 71 – 100 stig, so tað er meira enn ¾ av næmingunum, sum liggja í hesum bólki. Miðal stigatalið fyri alt landið í 2014 er 79,95 stig.

Tað eru færri næmingar, sum hava fingið próvtalsúrslit undir miðal, enn seinastu tvey árini. Samstundis sum næmingaparturin, ið liggur frá miðal til sera gott, er hægri, 96,7% í mun til 93,2% í 2013 og 95,6% í 2012. Tó hava bara 11,7% fingið úrslitið sera gott, og er hetta lægri enn bæði í 2012 og 2013, tá ávikavist 18% og 18,3% fingu úrslitið sera gott.

**6. flokkur**

Færri næmingar fáa hægsta stigabýtið frá 91 – 100 stig enn flestu árini frammaundan, meðan næmingaparturin, ið fær stigatalið 71 - 80 er hægri enn øll árini frammanundan. Tað sama er galdandi fyri stigatalið frá 81 – 90 undantikið í 2009. Miðal stigabýtið fyri landið er 75,9, sum er tað hægsta higartil.

Næmingaparturin, sum tilsamans fær próvtølini sera gott og gott, er 47,2%, sum er hægri enn árini frammanundan undantikið í 2011. Næmingarnir, sum fáa úrslitini frá miðal til sera gott telja 91,9%, sum er hægri enn hini árini frammanundan við undantak av 2009, tá talið var 92,3%. Eins og stigabýtið, so er miðal próvalið fyri landið í 2014 tað hægsta higartil, 4,19. Næmingarnir í støddfrøði í 6. flokki hava sostatt klárað seg rættiliga væl í landsroyndini.

# Náttúra og tøkni

Undirvísingin í lærugreinini hevur til endamáls

- at næmingurin við upplivingum og royndum fær innlit í fyribrigdi og samanhang í náttúruni
- at næmingurin fær innlit í, hvussu ymisk tøkni virkar, og lærir at nýta tól og amboð
- at hann víðkar hugsanir, mál og hugtøk, sum hava gerandsligt virði
- at næmingurin við eygleiðingum, kanningum og royndum mennir hegni, skapanarevni og samstarvsevni
- at kveikja gleði næminganna, forvitni og áhugan fyri náttúruni
- at menna áhugan fyri tøkni, lívstreytum og livikorum
- at næmingurin fær almenna vitan í landalæru, lívfrøði og alis-og evnafrøði
- at hjálpa næmingunum at fata samanspælið millum menniskjað og náttúruna úti og heima
- í huga og verki at menna ábyrgdina fyri náttúruni

## Ávegis mál í 4. flokki

Undirvísingin skal miða ímóti, at næmingar hava ognað sær kunnleika og fimi, sum ger teir førar fyri, at

- lýsa fyribrigdi sum ljós, ljóð og rørslu
- lýsa gerandislig viðurskifti innan tøkni, sum el og magnet
- greiða frá lufttrýsti
- greiða frá plantum og dýrum og teirra liviumstøðum
- greiða frá vatnringrás og vatnnýtslu
- greiða frá vanligastu fiskasløgunum undir Føroyum og teirra liviumstøðum
- lýsa nøkur fuglasløg, føði og tilhald
- greiða frá sansunum
- duga oyggjarnar í Føroyum, hægstu fjøll og nakrar býir/bygdir
- kenna norðurlond, høvuðsstaðir og fløgg
- kenna ættirnar og duga at brúka kumpass
- greiða frá um sólskipanina og sambandinum millum mánan, jørðina og sólina

## Ávegis mál í 6. flokki

Undirvísingin skal miða ímóti, at næmingar hava ognað sær kunnleika og fimi, sum ger teir førar fyri, at

- lýsa uppruna Føroya
- duga heimspartar, heimshøv og havstreymar
- greiða frá, hvussu náttúruvanlukkur ávirka liviumstøður hjá fólki og dýrum
- greiða frá sólskipanini og seta hana í samband við árstíðir, flóð og fjøru
- lýsa veðurlagsbelti
- kenna høvuðstættirnar í okkara fiskivinnu, veiðireiðskap og skipasløg
- greina liviumstøður hjá plantum og dýrum, vistskipanir og føðiketur
- kenna vanligastu fuglasløgini í Føroyum
- kenna vanligastu fiskasløgini í Føroyum
- kenna vanligastu dýrasløgini í Føroyum
- greiða frá høvuðs kropsgøgnum hjá fólki og teirra týdningi
- lýsa, hvussu matur og rørsla ávirka okkum
- greiða frá og duga hugtøk um streymnýtslu, streymkeldur, javnstreym og vendistreym

- lýsa, hvussu tøkni og dálking kunnu ávirka lívskorini hjá plantum, dýrum og menniskjum
- læra og nýta náttúruvísindaligt arbeiðslag við atliti at spurdómum, fyrireika og gera kanningar og samanbera kanningarúrslit
- læra at velja og nýta viðkomandi amboð og tól í kanningararbeiðnum, t.d. stereoluppar og indikatorar
- leggja fram kanningarúrslit og nýta ymiskar framløguhættir, sum grafar, tekstir, fyrilestur og drama

**Uppgávurnar í náttúru og tøkni**

Uppgávurnar í náttúru og tøkni í 4. og 6. flokki eru gjørdar við støði í ávegis málum í námsætlanini. Nøkur evni ganga aftur, men ávís broyting er í mun til royndina í 2013. Uppgávurnar vórðu settar innan hesi evni:

| **4 flokkur** | **6 flokkur** |
|---|---|
| Føroyar | Mannakroppurin |
| Býir og fløgg | Plantur |
| Fuglar | Gongustjørnurnar |
| Dýr i fjøruni | Firvaldar |
| Smákykt | Ættirnar |
| Plantur | Landalæra |
| Sansir | Hví tað regnar? |
| Magnetir | Laksur |
| Ættirnar | Sjóvarmálin |
| | Skip |
| | Fuglar |
| | Tsunámi |

**Royndarúrslit í 4. flokki**

Miðal stigatalið fyri landið í 2014 er 85,79 av 100 møguligum stigum í mun til 85,36 í 2013. Miðal próvtalið er 5,19, har hægsta próvtal er 6 og svarar til skotsmálið sera gott. Niðanfyri er yvirlit yvir, hvussu nógvir næmingar eru í hvørjum próvtalsbólki.

**Næmingatal í mun til skotsmál**

| Próvtal | Skotsmál | Næmingatal |
|---|---|---|
| 6 | Sera gott | 326 |
| 5 | Gott | 243 |
| 4 | Yvir miðal | 61 |
| 3 | Miðal | 53 |
| 2 | Undir miðal | 10 |
| 1 | Ikki nøktandi | 0 |

Talvan vísir, at fáir næmingar liggja undir miðal, og at 569 av 693 næmingum fáa úrslitini sera gott og gott, sum er meir enn ¾ av næmingatalinum

**Úrslit í %**

| Stig | Skotsmál | í % |
|---|---|---|
| 6 | Sera gott | 47,0 |
| 5 | Gott | 35,1 |
| 4 | Yvir miðal | 8,8 |
| 3 | Miðal | 7,7 |
| 2 | Undir miðal | 1,4 |
| 1 | Ikki nøktandi | 0 |

**Próvtalsbýtið í % - Náttúra og tøkni 4. flokkur**




Talvan vísir, at stórur partur av næmingunum, 82,1%, fáa úrslitini gott og sera gott. 90,9% hava fingið úrslitið frá yvir miðal til sera gott í mun til 94,2% í 2013. Næstan helvtin, 47% fáa skotsmálið sera gott. Í fjør var hetta talið 38,4%, ein góður triðingur. Sostatt hava rættiliga nógvir næmingar klárað at loyst uppgávuraðið nøktandi.

**Prótvalsbýtið í % – 2008 – 2014**

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ikki nøktandi | 0,1 | 0,0 | 0,3 | 0,3 | 0,5 | 0,0 | 0,0 |
| Undir miðal | 5,1 | 3,0 | 1,3 | 1,0 | 0,5 | 0,0 | 1,4 |
| Miðal | 25,2 | 15,4 | 11,6 | 8,2 | 5,0 | 5,8 | 7,7 |
| Yvir miðal | 23,0 | 24,8 | 14,8 | 16,3 | 12,0 | 11,4 | 8,8 |
| Gott | 43,2 | 48,2 | 50,6 | 55,7 | 64,0 | 44,4 | 35,1 |
| Sera gott | 3,4 | 8,6 | 21,4 | 18,5 | 18,0 | 38,4 | 47,0 |
| | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Talva 15 - Prótvalsbýtið í % - Náttúra og tøkni 4. flokkur**




***Talva 15*** vísir, at næmingabólkurin, sum fær skotsmálið sera gott, er størri enn øll árini frammanundan, 47%, men samstundis eru tað færri, sum fáa úrslitini gott og yvir miðal. Samlaða prótvalsbýtið vísir , at 1,4% fáa skotsmál, sum eru undir miðal. Í 2013 vóru eingir næmingar í hesum bólki og 1,0% í 2012.

**Royndarúrslit í 6. flokki**

Miðal stigatalið fyri landið er 80,14 av 100 møguligum stigum fyri samlaða uppgávuraðið. Miðal próvtalið er 4,77, har hægsta próvtal er 6 og svarar til skotsmálið sera gott. Niðanfyri er yvirlit yvir, hvussu nógvir næmingar eru í hvørjum bólki.

**Næmingatal í mun til skotsmál**

| Próvtal | Skotsmál | Næmingatal |
|---|---|---|
| 6 | Sera gott | 105 |
| 5 | Gott | 322 |
| 4 | Yvir miðal | 118 |
| 3 | Miðal | 57 |
| 2 | Undir miðal | 4 |
| 1 | Ikki nøktandi | 0 |

Talvan vísir, at bara 4 næmingar hava fingið skotsmál, sum er undir miðal. 427 næmingar fáa úrslitini sera gott og gott, og er hetta meir enn 2/3 av næmingunum. Tað vóru 606 næmingar í 6. flokki, sum vóru til roynd, og fingu 545 næmingar úrslitini frá yvir miðal til sera gott. Hetta er samstundis meginparturin av næmingunum, sum fáa trý tey hægstu próvtalsstigini.

**Úrslit í %**

| Stig | Skotsmál | Í % |
|---|---|---|
| 6 | Sera gott | 17,3 |
| 5 | Gott | 53,1 |
| 4 | Yvir miðal | 19,5 |
| 3 | Miðal | 9,4 |
| 2 | Undir miðal | 0,7 |
| 1 | Ikki nøktandi | 0 |

**Próvtalsbýtið í % í náttúru og tøkni**




Talvan vísir, at meginparturin av næmingunum fáa próvtølini 4, 5 og 6. Sostatt hava 89,9% av næmingunum fingið úrslitini yvir miðal, gott og sera gott. Yvir helvtin av øllum næmingunum, 53,1% hava fingið skotsmálið gott, meðan tað eru nógv færri, 17,3%, ið hava fingið úrslitið sera gott.

**Próvtalsbýtið í % í náttúru og tøkni árini 2008 – 2014**

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ikki nøktandi | 4,0 | 0,3 | 0,3 | 1,1 | 0,3 | 0,0 | 0,0 |
| Undir miðal | 37,7 | 8,6 | 3,2 | 14,2 | 7,0 | 0,8 | 0,7 |
| Miðal | 41,2 | 32,6 | 21,5 | 36,8 | 25,0 | 7,7 | 9,4 |
| Yvir miðal | 11,0 | 28,9 | 22,4 | 24,3 | 23,0 | 13,6 | 19,5 |
| Gott | 5,8 | 26,9 | 41,5 | 19,5 | 37,0 | 50,8 | 53,1 |
| Sera gott | 0,3 | 2,6 | 11,2 | 4,0 | 8,0 | 27,1 | 17,3 |
| | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Talva 16**




*Talva 16* vísir, at næmingaparturin, sum fær skotsmálið gott er 53,1%, sum er hægri enn árini frammanundan. Somuleiðis liggur næmingaparturin, ið fær úrslitið sera gott, høgt í mun til árini frammanundan undantikið í 2013, tá 27,1% fingu úrslitið sera gott, sum er tað hægsta øll árini. 89,9% av næmingunum hava fingið úrslitið yvir miðal til sera gott í mun til 91,5% í 2013 og 68% í 2012. Flestu næmingarnir liggja frá yvir miðal til sera gott, samstundis sum tað er ein rættiliga lítil partur, ið fær úrslitið undir miðal.

**Niðurstøður**
Næmingarnir í báðum árgangum kláraðu sum heild royndina væl, og flestu næmingar svaraðu eisini øllum spurningunum.

**4. flokkur**
82,1% av næmingunum, sum er meira enn ¾, fáa úrslitini sera gott og gott. 90,9% hava fingið úrslitið frá yvir miðal til sera gott í mun til 94,2% í 2013. Næstan helvtin, 47%, fær skotsmálið sera gott. Í fjør var úrslitið 38,4%, ein góður triðingur og í 2012 var tað 18% . Sostatt hava rættiliga nógvir næmingar klárað at loyst alt uppgávuraðið nøktandi.

**6. flokkur**
70,4% av næmingunum hava fingið úrslitið sera gott og gott, sum er tað mesta øll árini undantikið í 2013, tá 77,9% fingu úrslitið gott og sera gott. Meira enn helmingurin av næmingunum, 53,1%, fær skotsmálið gott, sum er nógv hægri enn árini frammanundan, undantikið í 2013, tá hetta úrslitið bara var eitt vet lægri, 50,8%.

# Miðalúrslit fyri landið árini 2008 - 2014

**Talva 17 Miðalúrslit 2008 - 2014**

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 4. flokkur | | | | | | | 6. flokkur | | | | | | |
| Fyrisøgn | 4,93 | 4,23 | 4,64 | 4,26 | 3,59 | 4,27 | 4,62 | 4,78 | 4,89 | 4,86 | 4,64 | 4,00 | 4,01 | 4,60 |
| Lesa og skilja | 3,53 | 4,06 | 3,57 | 4,63 | 4,59 | 4,57 | 5,31 | 4,00 | 4,89 | 4,43 | 4,23 | 4,69 | 4,96 | 4,91 |
| Mállæra | | | | | | | | 3,49 | 4,36 | 4,39 | 4,24 | 4,25 | 4,12 | 3,96 |
| Støddfrøði | 4,48 | 4,76 | 4,85 | 4,66 | 4,48 | 4,48 | 4,46 | 3,63 | 4,12 | 4,16 | 4,22 | 3,88 | 4,01 | 4,19 |
| Náttúra og tøkni | 4,14 | 4,44 | 4,85 | 4,81 | 4,94 | 5,15 | 5,19 | 2,78 | 3,81 | 4,16 | 3,60 | 4,11 | 4,95 | 4,77 |

Talva 17 vísir yvirlit yvir miðaltøl í hvørjari lærugrein í landsroyndini árini 2008 – 2014

**Talva 18 - Úrslit í 4. flokki í 2014**

| 4 flokkur | 2014 Miðal stigatal | 2014 Miðal próvtal |
|---|---|---|
| Lærugrein: | | |
| Føroysk fyrisøgn | 87,94 | 4,62 |
| Lesa og skilja | 96,00 | 5,31 |
| Støddfrøði | 79,95 | 4,46 |
| Náttúra og tøkni | 85,79 | 5,19 |

Talva 18 vísir miðal stigatøl og miðal próvtøl í 4. flokki í 2014

**Talva 19 – Úrslit í 6. flokki í 2014**

| 6. flokkur | 2014 Miðal stigatal | 2014 Miðal próvtal |
|---|---|---|
| Lærugrein: | | |
| Føroysk fyrisøgn | 131,13 | 4,60 |
| Lesa og skilja | 47,36 | 4,91 |
| Mállæra | 88,38 | 3,96 |
| Støddfrøði | 75,95 | 4,19 |
| Náttúra og tøkni | 80,14 | 4,77 |

Talva 19 vísir miðal stigatøl og miðal próvtøl í 6. flokki í 2014